# Upprit til landsstýrisfund

# um

# fólkateljingarverkætlan

## Bakgrund

Landsstýrið hevur sett á dagsskrá fólka- og bústaðateljing í samsvari við fólkateljingarátakið “Census 2010” hjá ST.

Síðani hava aðalráð og stovnar umrøtt málið á fleiri fundum og hava samtykt at skriva hesa stuttu frágreiðing til Landsstýrið.

Aðalráðini og stovnarnir eru sinnað at fara undir at fremja hesa fyrstu føroysku fólka- og bústaðateljingina og samstundis at menna almennu fyrisitingarligu skráirnar, sum saman við hagtølum eru avgerandi fortreyt fyri evidens grundaðum politikki.

## Málslýsing

Fólkateljingarátøk eru fyrst og fremst hagfrøðiligar teljingar. Men uttan góða grundleggjandi almenna skráseting í t.d. fólkayvirlit og adressuskrá, er nyttan av fólkateljingum munandi skerd. Tí mæla vit til eitt fólkateljingarátak, sum er samskipað við eitt átak til at fáa álítandi skráseting í fólkayvirlitið, at fáa allar íbúðir skrásettar og at fáa samanknýtt býlisskrá, adressuskrá og fólkayvirlit.

Verður farið fram eftir hesum leisti, verða ikki bara almennu skráirnar meira eftirfarandi, tí haraftrat fer nógv betur at bera til at fáa góð fólka- og sosialhagtøl millum fólkateljingarárini, grundað á fyrisitingarligu skráirnar og fólkateljingarúrslitini.

At almennu fyrisitingarligu skráirnar verða eftirfarandi, hevur stóran týdning fyri kostnaðin og tryggleikan í bæði almennari umsiting og privatum fyritakssemi. Neyv skráseting av borgarum á adressur, hevur týdning fyri allar almennar stovnar, sum skulu í samband við borgaran, so sum skattamyndugleikan, Almannastovuna, løgregluna, ambulansutænastuna og sjúkrahúsið, postverkið, sløkkiliðini og fleiri aðrar. Somuleiðis hevur skrásetingin stóran týdning fyri bankar og sparikassar, trygging og aðrar privatar fyritøkur, sum hava tørv á at kenna rætta bústaðin.

Fyri hagtalsvirksemið fara hesar almennu skráirnar at vera eitt stórt stig framá. Síðani seinastu fólkateljingina í 1977, hava vit ikki sæð hagtøl um føroysku familjurnar, men tá persóns- og adressuskráir eru fingnar upp á pláss, fer tað at bera til regluliga at lýsa familjuna í hagtølunum. Hetta merkir, at samfelagsliga býtið og onnur sosial viðurskifti tá kunnu gerast upp á familjur og ikki bara persónar. Kor hjá serligum samfelagsbólkum,

sum t.d. støkum uppihaldarum, pensjónistafamiljum ella barnafamiljum fara tá at verða sjónlig og kunnu leggjast til grund undir politiskum og samfelagsligum orðaskifti.

Fólkateljingin sjálv fer at geva okkum týðandi informasjón um borgararnar, og fer at lýsa demografisku, bústaðarligu og sosialu viðurskiftini hjá teimum, nógv meira umfatandi og detaljerað, enn vit eru von við. Tað eru bara fólkateljingar, sum kunnu geva okkum haldfastar upplýsingar um eitt nú hvørja útbúgving fólk hava, hvørji størv tey hava, hvussu býlisviðurskiftini eru ella hvussu húsarhaldsinntøkan er.

Skal hetta arbeiði eydnast og eydnast væl, verður neyðugt at fara til verka av álvara beinanvegin. Royndirnar úr Noreg í sambandi við fólkateljingina í 2001 siga okkum, at tað tekur drúgva tíð, at fyrireika eitt slíkt megnarverk. Neyðugt er at stíla fyri góðari stýring av samlaðu verkætlanini, soleiðis at tey, sum standa fyri arbeiðinum, hava tamarhald á gongdini, soleiðis at játtandi myndugleikin hevur gott yvirlit yvir verkætlanina.

Vit skjóta upp, at verkætlanin umfatar bæði sjálva fólkateljingina og eitt átak frammanundan, til at fáa fólkayvirlitið og adressuskránna samanknýtt. At fáa fólk neyvt skrásett í fólkayvirlitið og at fáa knýtt saman P-talið hjá borgarunum og L-talið í adressuskránni frammanundan fólkateljingini, ger bæði sjálva fólkateljingina og fyrisitingarligu skráirnar meira eftirfarandi og lættari at koma á mál við.

Uppskotið er tí, at settur verður ein stýrisbólkur við 5 persónum sum skjótast, og at ein verkætlanarsamskipari verður settur í starv. Til verkætlanarsamskiparan krevst játtan á fíggjarlógini 2007.

Landsstýrið má fyrst avgera, um verkætlanin skal rekast av einum aðalráð ella av fleiri aðalráðum saman.

Stýrisbólkin seta aðalstjórarnir. Hann skal umboða fakligu vitanina til at leiða eina verkætlan av hesum slag, men samstundis verða so smidligur, at hann kann halda títtar fundir við samskiparan, t.d. eina ferð um vikuna ella so. Avvarandi aðalráð eiga at verða umboðað í stýrisbólkinum við teimum avgerandi stovnunum, men umhugsast skal, um ikki kommunurnar áttu at vera bodnar uppí.

Stýrisbólkurin refererar til aðalstjórarnar, sum verða settir at reka verkætlanina og at hava ábyrgdina Landsstýrisins vegna. Tað verða aðalstjórarnir, sum saman við stýrisbólkinum leggja uppskotini fyri Landsstýrið.

Eitt breiðari forum eigur at vera knýtt at verkætlanini, sum heldur fundir hvønn ársfjórðing ella hálvár, alt eftir hvussu arbeiði gongur. Hetta kundi verið sama forum, sum innkallað var til fyrsta fundin um fólka- og bústaðateljing.

**Niðurstøða**

Landsstýrismenninir í innlendismálum og fíggjarmálum biðja hervið um undirtøku fyri at seta omanfyrinevndu verkætlan í gongd. Í hesum sambandi verður eisini biðið um undirtøku fyri at biðja Løgtingið um eykajáttan uppá 600 t.kr. til endamálið.

Tórshavn/Argir, tann 02. februar 2007

Jacob Vestergaard — landsstýrismaður

Bárður Nielsen — landsstýrismaður